

*Heimskendi, týski málverjin, Lutz Phannenstiel, við konu síni, Amaliu, við Bøsdalafossin í Sørvági*

# Heimskent fótbóltspar í føroyskt vinnulív

**Heimskendi fótbóltsleikarin, Lutz Phannenstiel, kom til Føroyar í gjár við konu síni Amaliu Phannenstiel. Kenda parið eru ikki komin at halda frí, men eru tvørturímóti komin hagar í arbeiðsørindum. Tey bæði arbeiða við einari verkætlan, ið fer at ávirka allan heimin, og eru nú komin til Føroyar at søkja stuðul**

ÍTRÓTTUR
*Bjørk Olsen*
*bjork@sosialurin.fo*

Føroyar fingu ein heimskendan gest í gjár, tá týski málverjin, Lutz Pfannenstiel, og kona hansara stigu úr flogfarinum, inn í bilin, oman gjøgnum bøin og oman í »Lake-ride«, ið silgdu tey runt á Leitisvatn saman við Sosialinum. Lutz Pfannenstiel er áhugaverdur, tí at hann er einasti fótbóltsleikarin, ið hevur spælt yrkisfótbólt í øllum heimspørtum, har skipaður fótbóltur verður spældur. Málverjin manglar nú bara Antarktis, og hetta er orsøkin til, at hann er í Føroyum. Lutz og Amalia Pfannenstiel arbeiða við einari verkætlan til frama fyri tálmingini av co2-útlátinum í heiminum. Í hesum sambandi skipar parið fyri einum fótbóltsdysti á Antarktis í desembur næsta ár, har kend ítróttarfólk skulu leika. Jutz ferðast nú runt í ymiskum londum at kanna møguleikarnar fyri stuðli til verkætlanina.

## Ferðafólkavinnu í Føroyum

Ólavur Waag Høgnesen, leikaraumboðsmaður hjá FSF, er tilknýtið teirra til Føroya. Ólavur var eisini umborð á »Lake-ride« og greiddi frá, hvønn leiklut hann hevur í samstarvinum. Ólavur W. Høgnesen samstarvaði fyrst við Lutz Phannenstiel viðvíkjandi verkætlanina á Antarktis, men síðan fór hann eisini at samstarva við konu hansara. Amalia Phannenstiel starvast, umframt at vera skrivari hjá manni sínum, innan ferðavinnu. Amalia hevur flutt ferðafólk millum Russland og Eysturríki, og nú arbeiða Amalia Pfhannenstiel og Ólavur W. Høgnesen fyri at skapa eina ferðavinnu í Føroyum fyri russiskum ferðafólkum. Føroyski leikaraumboðsmaðurin greiðir frá, at nógvir pengar liggja í at flyta russisk ferðafólk og heldur tí, at hetta er eitt frálíkt hugskot.

- Vit skipa longu fyri at fáa russiskar ferðabólkar runt í evropiska meginlandinum, so hví ikki Føroyar? spyr Amalia Pfannenstiel.

- Tað verða bólkaferðir fyrst og fremst til hotellini. Tað er so ætlanin at sameina ferðir við skipaðum og óskipaðum útferðum – hesar útferðir eru vit so komin til Føroya at kann nú, greiðir Ólavur W. Høgnesen frá. Amalia Pfannenstiel sær landið við útlendskum eygum, og tí ber enn betri til at skipa fyri útferðum, ið eru eggjandi fyri útlendingum.

## Keypa føroyskt felag

»Lake-ride« leggur at við Bøsdalafoss. Heimskenda parið, ið eru í sandalum og kovboybuksum, fáa ulluntar hosur, regnjakka og gummistivlar, og so fer leiðin út til fossin. Meðan tey ganga og stríðast á vátu steinunum, fær Sosialurin eitt prát við Lutz Phannanstiel.

Hví er tað akkurát Global Warming, tú brennur fyri ?

- Tí, at eg trúgvi, at í løtuni er hetta størsti trupulleikin í heiminum. Um fólk ikki viðurkenna, hvat er í vanda, vil trupulleikin skjótari gerast størri. Hendan verkætlanin fer serliga at ávirka tey londini, ið longu eru ávirkaði av Global Warming, greiðir Lutz Phannenstiel frá. Hann hevur lisið nógv um verðinstrupulleikan og sigur frá, at kvinnurnar í Grønlandi fáa ikki longur givið bróst orsakað av vaksanda hitanum. Trupulleikin ávirkar ikki longur bara náttúruna; men eisini beinleiðis okkum menniskju.

*Hvussu kann verkætlanin ávirka verðinstøðuna?*

- Verkætlanin er tann rætta. Øllum dáma fótbólt. Fótbóltur er størsta ítróttargreinin í verðini, flest fólk fylgja við, og tí átti at borið til at ávirka hendan vegin.

Ólavur W. Høgnesen tekur yvir og greiðir frá, hvussu dagarnir hjá Lutz og Amaliu Phannenstiel fara at líða.

- Ørindini hjá honum eru tvinnandi. Annað er at leggja fram um Antarktisætlanini. Lutz hevur bjóðað vinnulívinum og myndugleikunum til almennu framløguna, ið verður á Hotel Føroyum mánadagin klokkan eitt. Ólavur W. Høgnesen greiðir frá, at tað verður ein stór, altjóða verkætlan, ið stórar fjølmiðlar fara at dekka. Føroyar kunnu fáa stóra ágóðan av hesari brandingini út í verðina. Lutz Pfannenstiel hevur eisini eina aðra ætlan. Fótbóltsleikarin hevur ein dreym at eiga eitt føroyskt fótbóltsfelag. Hann fer ein av døgunum á fund við føroysku fótbóltsfeløgunum at kanna, hvørjir møguleikar eru fyri at keypa eitt slíkt felag. Fundurin verður ikki almennur. Tað hevði verið stuttligt at átt eitt føroyskt felag fyri at menna tað at klára seg altjóðum høpi, greiðir føroyski umboðsmaðurin frá. Lutz Pfannenstiel er bergtikin, at føroysku feløgini longu megna tað, tey gera í dag, men veit, at tað ber til at koma longri. Ætlanin er at menna teir føroysku leikararnar og síðan selja teir til onnur feløg.